**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance

# Lønarlyft hjá Heilsurøktarafelagnum

Í samgonguskjalinum varð avtalað, at samgongan vil geva lægst løntu bólkunum á umsorganarøkinum eitt lønarlyft.

Landsstýrið hevur avgjørt, at hesir bólkar verða umfataðir av lønarlyftinum: Námsfrøðingar, námsfrøðihjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar og heilsuhjálparar.

Talan er um bólkar sum starvast innan eldra-, dagstovna- og almannaøkið, har trupult er at nøkta starvsfólktørvin.

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hevur í hesum sambandi avgjørt, at lønin hjá heilsurøktarum hækkar kr. 1.390,92 tann 1. januar 2024, sí hjáløgdu lønartalvu. § 22 í sáttmálanum verður samstundis tillagað, soleiðis at frá 1. januar 2024 verður 15 % goldið í eftirløn til tímalønt starvsfólk.

Tinganes, tann 20. juni 2023

**Heilsurøktarafelagið**

Bingerð H. Fosságil, forkvinna

Bingerð H. Fosságil

**Fíggjarmálaráðið**

Ruth Vang

Ruth Vang, landsstýriskvinna

/ Marjun Faadsen

BHF RV.

Tinganes • Box 2039 • FO-110 Tórshavn
(+298) 35 20 20 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo